Jólagávur

Sólrún Michelsen



Jólagávur

Sólrún Michelsen

Jólagávur

Astrid MacDonald teknaði

This One
6134-KXF-HTFK

SNÍPA
Føroya Skúlabókagrunnur

Jólagávur

Rithøvundur: Sólrún Michelsen

Tekningar: Astrid MacDonald

© 2005, Føroya Skúlabókagrunnur

Umbróting, repro, prent og innbinding: Føroyaprent

ISBN 99918-0-402-1

SNÍPURNAR verða flokkaðar í 3 *litir:*

Gular:	1., 2. og 3. flokkur
Bláar:	4., 5. og 6. flokkur
Vínreyðar:	7. flokkur og eldri

Í hvørjum liti eru 3 *torleikastig:*

 Løtt

 Miðal


 Torfør


Henda bókin er gul 



Hervør vaknar,
hon gleðir seg
til okkurt gott.

Jóla-kalendarin.
Hon fer inn til Høgna.
– Høgni, Høgni vakna nú.
Hon tekur dýnuna.







– Ert tú svøk?
Gev mær dýnuna.

– Jóla-kalendarin,
sigur hon.
Tey renna inn í køkin.





Jóla-kalendarin er so vakur.
Har eru tøl á.
Úr 1 og upp í 24.



Tveir pakkar eru í nummar 1.
4 kara-mellur eru í.


– Eg goymi mínar,
sigur Hervør.
– Eg goymi ikki mínar,
sigur Høgni.






Hervør mungar.
– Eg eti eina nú,
sigur hon.

– Tað er nátt,
sigur Høgni.
– Vit fara aftur í song.




Nú er ein vika
til jóla.
Tey baka
við mammu
og práta um
jóla-gávur.





Hervør og Høgni tosa
um jóla-gávur.
Tey hava einki
til mammu og pápa.



– Vit eiga ongar pengar,
sigur Høgni.
Tey hugsa.
– Vit kunnu vaska bilar,
sigur Hervør.
– Tað kostar 10 kr.




Onkur sigur nei takk,
men ein kona sigur ja takk.




Bilurin er so skitin.
So vaska tey.

Høgni spular skúmið av.
Hann spular Hervør eitt sindur.



Hervør oysir á Høgna.
Tey eru vát.
So fara tey inn til konuna.






Konan er blíð.
Tey fáa 20 krónur
og fara til hús.

Hervør og Høgni fara heim
at lata seg í turr klæði.






– Hvat nú? spyr Hervør
– Kom yvir til ommu,
sigur Høgni.

Tey fara upp
á ovasta loft at leita.
Har er myrkt.
Hervør er fyrr.






Hon lýsir.
Har eru nógvir kassar.



Tey finna ein skort
úr Afrika til pápa
og eina viftu til mammu.

Tey fáa pipar-nøtur
og jóla-øl frá ommu.





Tey keypa kara-mellur
fyri 20 krónuna.
Mamma og pápi fáa,
og tey eta sjálv.

– Nú kunnu jólini koma,
sigur Hervør.
– Ja, sigur Høgni.





SNÍPA

Føroya Skúlabókagrunnur